# Ódnarbátur keyptur til Skála

**Kári Johannesen av Skála hevur keypt eina luksusyacht úr USA. Báturin var sokkin í ódnini Ritu, men síðani er hann fingin uppaftur. Eftir stórar trupulleikar við flutninginum er báturin komin til Skála, har ið Kári sjálvur fer at umvæla skaðarnar. Hann ætlar at leiða bátin út til ferðafólk, sum fegin vilja sleppa ein fiskitúr**




*Talan verður uttan iva um eitt glæsiligt far, tá umvælingararbeiðið er liðugt. Stórsligin sær báturin hjá Kára í øllum førum út*

LUKSUSYACHT

*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Kári Johannesen, fyrrverandi borgarstjóri í fyrrverandi kommununi Skála Kommunu, hevur keypt ein bát úr USA. Talan er um eina rættiliga luksusyacht. Hann hevur keypt bátin á uppboðssølu á alnetinum.

Báturin var sokkin í ódnini Ritu. Áðrenn tað hevði hann longu verið ígjøgnum eina meira kenda ódn, sum kallast Katrina. Hana yvirlivdi báturin, men til tað seinnu hekk hann uppi í trossum yvir ein bátahyl. Trossarnir slitnaðu, og báturin fór við afturpartinum fyrst niður í sjógvin og sakk. Síðani er báturin fingin upp aftur, men hann hevur fingið skaða.

Kári ætlar sær sjálvur at umvæla bátin:

- Eg havi fulltíðarstarv, og tí eru tað bara onkrar løtur, eg fái tíð til at putlast í bátinum. Eg ætli mær, at hann skal sigla næsta summar. Skaðarnir uttan verða lætt ordnaðir, men mestsum alt innan skal skiftast út, sigur Kári.

## Fer at leiga bátin út

Báturin er sera stórur, og tá ið alt innbúgvið er komið inn í hann aftur, er talan um ein rættiligan luksusbát. Hann hevur tvey stór WC við brúsu, tvey kømur og tvær stovur. Umframt tað hevur hann aircondition, vatnkølara, køliskáp, frystiboks, fleiri sjónvørp og mangt annað. Tann eina stovan er sera stór, og ein flott hjørnasofa skal standa í einum hjørni.

Kári sigur, at tað var av handilsligum orsøkum, at hann keypti bátin:

- Eg fekk bátin fyri ein góðan prís. Hesin hevði kostað fleiri milliónir sum nýggjur. Eg ætli mær at leiga hann út til fiskitúrar. Eg veit, at tað eru nógv ferðafólk, sum fegin vilja gjalda nógvar pengar fyri at sleppa ein túr við einum tílíkum báti. Á tann hátt ætli eg mær at vinna peningin inn aftur, sigur Kári.

## Trupul flutningur

Kári er sera glaður um at hava fingið bátin heim, men tað var ikki lætt at fáa bátin fluttan úr USA til Føroya.

- Tað vóru ymiskir trupulleikar við flutninginum. Eg keypti bátin longu í februar, men nústani havi eg fingið hann til Føroya. Hann skuldi koyrast langt í USA, og so fekk eg hann til Týsklands. Har stóð hann í hálvan annan mánað, og síðani fluttu teir hann til Svøríkis. Tá leigaði eg eitt skip yvir eftir honum, og langt um leingi er hann her, sigur Kári.

Nú stendur báturin á landi við bátahylin á Skála, har ið Kári arbeiðir við bátin.

- Tað koma allatíðina fólk framvið, sum vilja síggja bátin. Tað hevur verið sera stórur áhugi, sigur Kári.

Um umleið eitt ár kunnu føroyingar vænta sær at síggja eina luksusyacht á teimum føroysku firðunum. Helst verða tað ríkir útlendingar, sum koma at nýta bátin mest.

# Høvuðsnøvnini á Fjarðafestivalinum úr at gera

Høvuðsnøvnini á Fjarðafestivalinum, Michael Tait og All Star United, hava nógv um at vera nú beint áðrenn teirra ferð til Føroya

Michael Tait og All Star United mugu sigast at vera høvuðsnøvnini á Fjarðafestivalinum. Michael Tait er serliga kendur sum ein av teimum trimum sangarunum í bólkinum DC Talk.

Michael Tait skal nú spæla við í einari stórari operu kallað „Hero“ saman við nógvum øðrum kendum. M.a. spælir Rebecca St. James eisini við. Rebecca var fyri stuttum í Føroyum, har ið hon helt konsert í kelduni.

All Star United eru ein kendur kristiligur bólkur úr USA. Teir eru á konsertferð í Evropa í løtuni. Teir koma í hesum sambandi ein túr til Føroya til Fjarðafestivalin. Teir hava tí bestu fortreytir at vera í góðari venjing til konsertina í Føroyum.

Meira kann lesast um festivalin á www.fjardafestival.com

*- HeiniK*

Klaksvíkar Kommuna / Svimjihøllin



## Svimjihallarleiðari

**Klaksvíkar Svimjihøll stendur í dag framman fyri nógvum nýggjum avbjóðingum:**
- Heilsa og likamsrøkt fær alsamt størri týdning
- Norðoyatunnilin hevur latið upp, og
- Sjøtil er settur á eina spennandi útbyggingarætlan.

Til at stjórna, selja og vera við til at menna svimjihøllina, verður søkt eftir nýggjum svimjihallarleiðara at byrja í næstum.

**Høvuðsuppgávurnar eru:**
- At stjórna, selja og vera við til at menna tilboðini í svimjihøllini.
- At tryggja eitt til eina og hvørja tíð trygt, reint og dámligt umhvørvi í høllini
- At hava ábyrgd av dagliga virkseminum, m.a. yvir fyri starvsfólkum og viðskiftafólkum, tekniskt og fíggjarliga.

**Vit sóknast eftir persóni, ið:**
- Hevur hugsjónir um virksemi í eini svimjihøll.
- Hevur neyðugan kunnleika og fortreytir fyri at hava ábyrgd av svimjihøllini.
- Kann ganga á odda og arbeiða sjálvstøðugt.

**Setanarviðurskifti:**
- Talan er um eitt fulltíðarstarv.
- Lønar- og setanarviðurskifti sambært sáttmála millum KAF og Starvsmannafelagið, lønarflokkur 5.
- Hevur tilvísing til Mentanardeildina

**Fleiri upplýsingar**
kunnu síggjast í starvslýsingini á heimasíðuni www.klaksvik.fo og kunnu annars fáast við at venda sær til býráðsskrivaran ella mentanardeildarleiðaran á tel. 410000

Umsóknir, saman við prógvi, heilsuváttan og møguligum viðmælum v.m., verða at senda til:

**Klaksvíkar Býráð**
**Postsmoga 2**
**700 Klaksvík**

og skulu vera okkum í hendi **í seinasta lagi á middegi mánadagin 14. august 2006**

creδ 458006

**Klaksvíkar Svimjihøll:**
Er ein av íalt trimum svimjihallum í landinum, sum hevur 25 metra svimjingarhyl. Inniheldur annars barna- og familjuvinarligt umhvørvi við grunnum hyli við ymiskum lutum at spæla við, hitarúm v.m. Varð bygd í 1974. Er í løtuni undir um- og nýbygging og fer seinni í ár at lata upp við tí fyrstu, stóru skreiðibreytini í landinum, vatnlandi v.m. Umframt leiðaran eru fýra starvsfólk í føstum starvi umframt eitt ávíst tal av avloysarum.

Klaksvíkar Kommuna | Nólsoyar Pálsgøta 32 | FO-700 Klaksvík
Tel. 410000 | Fax. 410001 | klaksvik@klaksvik.fo | www.klaksvik.fo